# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Obama besta trygdin

Henda vikan hevur verið hendingarrík í amerikonskum politikki. Og í flestu førum hevur Obama forseti verið í miðdeplinum. Flokkur hansara tapti týðandi senatsvalið í Massachusetts, Obama kunngjørdi eina ætlan at seta avmarkingar fyri virkseminum hjá stóru bankunum, og eitt ár er farið síðani hann tók við sum forseti.

Tað kom sum eitt sjokk fyri øll, at republikanari vann senatsvalið í demokratisku háborgini í Massachusetts. Hetta er staturin, har ein Kennedy fyri og annar eftir eru valdir, men eingin hevði gáað um, at hesin liberali og frísinti staturin skuldi snara til høgru eftir eini nátt. Helst hava demakratarnir sovið í tímanum og hildið, at sigurin varð tryggjaður uppá forhond. Og hetta mugu Obama og politiska flaggskip hansara, heilsureformurin, svíða fyri.

Tað er greitt, at soleiðis sum samansetingin er av senatinum, hevur Obama mist avgerandi meirilutan, og tí hevur hansara hjartasak fingið eitt skot fyri bógvin. Tó so at demokratarnir framvegis eru í meiriluta í bæði umboðsmannatingi og senati. Politiska søga USA vísir, at royndirnar at fáa gjøgnumført ábøtur í heilsutrygdini er sum at spæla við eld. Nógvir frægir forsetar hava sett hetta út í kortið fyri síðani at staðfesta, at torført ella ómøguligt er at fáa neyðugu undirtøkuna. Men Obama tykist standa fast við sítt og hevur gjørt hetta til eina hjartasak, nevniliga at tryggja teimum mongu milliónunum av fátækum amerikanarum eina heilsutrygd, sum onnur demokratisk vælferðarsamfeløg byggja á.

At Obama ikki er nøkur døgnfluga fingu vit eisini prógv fyri í gjár, tá hann rætt og slætt fór í "hernað" móti stóru bankunum. Bert eitt ár eftir, at hann gjøgnum risalán úr almenna kassanum tryggjaði somu bankum framhaldandi livilíkindi, eru bankaleiðslurnar farnar at útgjalda sær svimbulkendar og ørandi bonusupphæddir. Hetta skal steðgast sigur Obama. Og hann fer longur. Fyri at skrædlið ikki skal endurtaka seg verða lógir gjørdar, sum avmarka møguleikar hjá bankum og íløgufeløgum at reka amoralskan og oyðandi íløgupolitikk. Bankarnir skulu eisini tvingast til at seta av til egna trygd osfr.

Obama hevur sitið eitt ár í forsetasessinum. Búskaparkreppan hevur merkt hesa tíðina. Støðan í Irak, í Miðeystri sum heild, í Afghanistan og í Pakistan er framvegis sera spent. Obama hevur higartil valt dialogin heldur enn at taka til hermegi, tó at hann hevur avgjørt at senda fleiri herenn til Afghanistan. Sum frálíður vilja veljararnir síggja úrslit ella broytingar. Hetta verður tí ein torfør tíð hjá Obama, sum sjálvandi ikki broytir heimsstsøðuna eftir einum ári. Men hann verður noyddur til at borðreiða við onkum ítøkiligum skal hann vinna týðandi valini til heystar. Bankaátøkini er ein partur av hesum. Ágangurin frá høgru er øgiligur og eigur ongantíð at undirmetast. Vit kunnu fegnast um, at meirilutin av amerikanarum stuðla Obama, tí bara hann er í løtuni førur fyri at skapa frið, trygd og vælferð fyri øll.

**Sosialurin**

## Sniðálop á skúvoyingar frá Johan Dahl og SSL

**HARRY JENSEN**

Skúgvi

Eitt, sum eykennir eitt sniðálop, er at allar fyrireikingar áðrenn álopið, sjálvandi eru duldar sum mansmorð.

Tað, sum eftir øllum at døma skal henda við okkara framtíðar farmaflutningi, kann illa metast sum annað enn eitt sniðálop.

Eftir sum skilst eru ætlanir at seta ein óbrúkiligan bát inn fyri Rituna, men vit, sum skulu brúka henda bát, fáa onki at vita, sjálvt um tað sær út til, at hetta hevur verið fyrireika í langa tíð.

Strandferðslan var vælmannað í Skúgvi seinasta summar, og kunnaði okkum um framtíðar ætlanir.

Tað ljóðaði somikið væl, at vónirnar um okkurt brúkiligt vóru hampuliga góðar, eg trúði í hvussu er, at viljin var til staðar, at gera okkurt gott.

Nú hevur so onkur likið somikið, at tað sæst, at ætlanirnar tvørtur ímóti, eru at gera alt nógv truplari, fyri ikki at siga ómøguligt fyri okkum.

Tá eg fyri einum 4 døgum síðani hoyrdi um hetta, ringdi eg til Boga Mortensen stjóra í SSL.

Hann meinti sjálvandi ikki, at nakað var dult, men tað passar í hvussu er ikki. Tá hann kanska føldi seg eitt sindur kroystan, segði hann mær um ymiskt annað, sum eisini var á borðinum, millum annað, at Sildberin kanska bara skal sigla um summarið.

Í dag fekk eg so aftur okkurt at vita, sum fekk meg, at seta meg at skriva.

Eg tími ikki at koma nærri inn á evnið enn hetta, eisini tí eg ikki veit, hvat er rætt, av tí sum hoyrist, vit vita jú øll, at leysasøgur ikki altíð eru heilt eftirfarandi, so eg vóni, at tit, sum varða av hesum koma út úr skotunum, og siga sum er.

Eitt, sum hevði verið sera áhugavert at fingið at vita, er hví tað er so alneyðugt, at fáa handan bátin inn í hitan hjá SSL.

Tað finnast, uttan iva, fleiri skip, bæði her í Føroyum og í grannalondunum, sum heilt vist eru brúkilig.

Hasin báturin er ónýtuligur, men kortini hevur tað verið roynt í mánaðavís, at trýsta hann inn.

Í mai mánaði frættu vit, at Ritan skuldi í Norðoyggjar at sigla, tað frættu vit í útvarpinum, av einum fundi í Nólsoy.

Ritan er okkara einasta farmaleið, vit hava hana einaferð um vikuna. Tey, sum kenna til okkara viðurskifti vita, at um veturin eru fleiri vikur, har ongin farmatúrur er orsaka av veðri. Tí er tað bara á pappírinum, vit hava 52 famatúrar um ári.

Vit gjørdu vart við okkum í brævi, dagfest 8. juni 2009.

22. septembur 2009 kemur so svar úr Vinnumálaráðnum, undirskrivað av Johan Dahl og Kjartan Kristiansen. Í brævinum framgongur heilt greitt, at Ritan skal halda fram sum áður, við einum túri úr Havn um vikuna. Ritan verður ikki tikin úr hesi sigling uttan so, at farleiðin kann gerast líka væl við øðrum skipi.

Nú er so aftur alt enda í sama skilið.

Tað er ikki lætt at trúgva landsstýrismanninum, ella SSL, tá soleiðis verður atborið.

Ongin vil missa nakað, sum kann nýtast, fyri okkurt nógv verri, heldur ikki vit.

Vit vilja sjálvandi fegin fáa betri ferðasamband, men sum vit so ofta hava sagt, so leingi sum havnarumstøðurnar eru, sum tær eru, er best at lata alt verða sum er.

Suðuroyingar hava sanniliga havt sínar trupulleikar av strandferðslu og myndugleikunum, teir hava barst fyri síni søk, og hava vunnið nokkso nógv, men høvdu tey slakað tað allar minsta, var helst ongin nýggjur Smyril í dag.

Tí er tað eitt sindur hugvekjandi, at tey, sum standa aftan fyri hetta, øll eru suðuroyingar, líka frá tí lægsta til avvarðandi landsstýrismann.

So mikið av seiggi mátti verið eftir í tykkum frá øllum teimum gomlu kempunum og gandakallunum í Suðuroy, sum tit eru so errin av, at tit ikki gera slíkt ímóti okkum fámentu skúvoyingum.

Við vón um størri opinleika.

## Valskipanin

Undirritaði ynskir eina atkvøðugreiðslu um valskipanina!
... har øll sleppa at luttaka.

**Jógvan Olsen**
**Tórshavn**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.